# á Selatrað

# Gott pláss fyri sámiliga prís


Smáttan á campingøkinum

**Heimasíðan camping.fo gevur kampingplássinum á Selatrað góð ummæli. - Blíðskapurin er í hásæti, og fólkini í bygdini eru sjáldsama vinarlig og fyrikomandi, verður sagt í greinini**

KAMPINGPLÁSS

16. mai 2007 gekk leiðin við húsvogninum til Selatraðar. Tá vit nærkaðust Selatrað, ringdu vit - sum avtalað - til Jákup Weihe, leiðara av kampingplássinum og boðaðu honum frá, at vit vóru á veg.

Tað er gott koyrandi til Selatraðar, sjálvt um vegurin tað seinasta strekkið er smalur. Okkara vognur er 2,30 cm. breiður og vit komu fram í øllum góðum, so tað er óivað eisini koyrandi við eitt sindur breiðari vogni.

### Gott hugskot

Kampingplássið liggur framvið brimgarðinum niðast í bygdini, har er pláss fyri fleiri vognum, økið er grúsøki, sum vit meta riggar væl, men kommunan hevur ætlan um at asfaltera. Á økið er - fyribils - settur ein vognur við eini brúsu, einum hondvaski og ein wc-kummu. Har er heitt/kalt vatn, ljós stikkari til fønara/barbermaskinu og el-hiti. Uttanfyri er ein brunnur til tøming av spillvatni og ein brunnur til tøming av wc. Alt hettar fungerar "perfekt". Vit hava frætt, at ætlanin er at seta skúrar upp seinni.

Plássið er spennandi fyri børn. Øðrumegin er ein stórur hylur við krabbum og øðrum spennandi í, og hinumegin er ein "pinkulítil" strond við malargróti. Kampingplássið er á eini kei, har liggja eisini fleiri bátar so tað er nokk "smart" at hava bjargingarvestar til børnini. Skótadepilin og viðarlundin liggja ein stuttan gongutúr har frá.

Á plássinum eru tríggir elsteyrar har (við serligum kortum) kann keypast el og vatn. Kortini skulu keypast fyri kr. 100 frá kampingleiðaranum (100 kr. depositum og 100 el), so ein avgerð sjálvur upphæddina, ið ein vil keypa el fyri. Eftirverandi upphædd verður førd aftur á kortið. Soleiðis kann kortið brúkast aftur og aftur, tað er bara at fylla meira pening inn á kortið - genialt!

Frá kampingleiðaranum fingu vit upplýst at prísurin er kr. 50 pr. vogn pr. byrjað døgn. Hetta meta vit verða eina "sera-sera" sámiliga upphædd. Prísurin er broyttur nakrar ferðir, so vit vita ikki um upphæddin verður broytt aftur, men ráðiligt er at spyrja um prísin tá ein biður um pláss, so eingin ivaspurningur er.

### Grind á Selatrað

Vit meta kampingplássið á Selatrað at vera eitt serstakliga gott kampingpláss. Blíðskapurin er í hásæti, fólkini í bygdini eru sjáldsama vinarlig og fyrikomandi og kampingplássið verður rikið "professionelt".

Gert tú "lekkurtsultin", kanst tú bara spáka tær yvir til tað lítla svarta húsið, ið stendur á keiøkinum, og spyrja Óla um tú kanst keypa turra grind og spik. Vit fingu ein (stóra) smakkiroynd frá honum. Tað smakkaði óført, so tað vilja vit hervið ráða tykkum til at royna.

Okkara niðurstøða er, at kampingplássið á Selatrað er eitt deiligt kampingpláss og vilja vit tí mæla øðrum til at royna tað.


*- Tá bilarnir kortini vóru her, kundu vit eins væl fáa nøkur oyru burtur úr tí við hesum kampingplássinum, sigur Malena Thomsen, borgarstjóri sum her er avmyndað saman við umsjónarmanninum, Jákupi Weihe*
*Mynd: Høgni Thomsen*

## Tørvurin var til staðar

- Vit sóu ofta bilar standa her á Selatrað. Tá teir kortini vóru her, kundu vit eins væl gera eitt kampingøki og soleiðis fáa nøkur oyru burtur úr tí, sigur Malena Thomsen, borgarstjóri í Sjóvar kommunu.

Á fundi í mars mánaði varð samtykt, at skipa økið við havnarlagið á Selatrað sum kampingøki – eitt øki, sum í roynd og veru var klárt at taka í nýtslu.

Frammanundan hesum hevði Sjóvar kommuna, sum Selatrað er ein partur av, broytt byggisamtyktina fyri økið. Og síðani var klárt at fara til verka við kampingplássinum.

Ætlanin er kortini ikki, at kommunan sjálv skal reka hetta økið, men fáa onkran annan at leiga økið frá kommununi og brúka tað til ferðavinnu.

Selatrað er jú frá skaparans hond eitt sera náttúruvakurt øki, við vakrari fjøru og góðum útsýni yvir Sundalagið.

Økið er eisini serliga væl egnað til barnafamiljur. Tað hoyra tey eisini frá fólki, at børnini hava trivist sera væl.

- Tey hava fangað krabbar og annað. Ein dagin bað ein smágenta meg koma til eitt stað fyri at vísa mær alt tað, sum tey høvdu fangað í fjøruni. Ja, tey høvdu snøgt sagt stovnað ein djórahandil!, sigur Jákup við einum brosi.